## Færri ferðast uttanlands



Fíggjarkreppan í Íslandi hevur av álvara fingið íslendingar at skerja útreiðslurnar til uttanlandsferðir og at ferðast innanlands ístaðin fyri. Morgunblaðið skrivar, at í juli fóru 23.000 íslendingar av landinum við flogfari ímóti 44.000 í sama mánaði í fjør, og at teir fyrstu sjey mánaðirnar vóru tølini ávikavist 148.000 í ár ímóti 272.000 í fjør ella 46 prosent minni. Hinvegin hava heldur fleiri útlendingar vitjað í Íslandi í ár enn í fjør. Fleiri spaniumenn, italiumenn, finnlendingar og kanadiumenn hava vitjað Ísland í ár, men 21 prosent færri bretar, skrivar Morgunblaðið.

## Bjóða irakum arbeiði

Fólk, sum eru ímóti avgerðini hjá donsku stjórnini at senda flóttafólk aftur til Irak, hava nú stovnað eina skrivstovu, sum skal royna at útvega teimum útvístu irakunum arbeiði í Danmark. Kunnu teir fáa minst 31.000 krónur um mánaðin, kunnu teir fáa fyribils uppihaldsloyvi í Danmark, skrivar DR á heimasíðu síni. Men í stjórnarflokkinum Vinstra halda tey ikki, at hetta er loyvt. Ein talsmaður fyri flokkin segði í gjár, at skipanin, sum stuðulsfólkini hjá irakunum sipa til, er ikki ætlað at forða fyri, at fólk verða send heim, tá myndugleikarnir hava givið boð um tað.

# Johanna rendi seg undir

**Vágssluppin Johanna fekk fitt at skaða, tá ið hon rendi seg undir á veg suður til Vágs av sjómannadegnum í Klaksvík**




*Bæði sprytið, krosstræið og toppstongin brotnaðu, tá ið Johanna setti seg á Mjóvanesi í gjáramorgunin*

SKAÐASJÓGVUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ilt er at byggja borð fyri báru, sigur eitt gamalt orðatak.

Hetta mátti manningin á vágssluppini, Johonnu, ásanna, tá ið teir sunnumorgunin vóru á veg heim aftur til Vágs úr Klaksvík, har teir høvdu verið á sjómannadegi.

Á Mjóvanesi komu teir í nakað av aldu, tó at vindurin var lítil.

- Vit tóku ferðina av skipinum, men brádliga rendi hon seg undir, sigur skiparin, Bjarni Brattaberg.

Hann sigur, at stoyturin var so mikið harður, at bæði krosstræið, toppstongin og sprytið brotnaðu tvørtur av heilt inni við stevnið.

Skiparin sigur, at hetta var stak óheppið, tí Johanna hevur mangan verið í verri sjógvi enn hetta og hon er eisini mangan farin djúpari enn hetta.

- Tað vildi bara illa til og tá ið tann rætta aldan rakar, brýtur hon frá sær. Tað kemur ikki ofta fyri, at sprytið brotnar, men tað hendi so hesuferð, leggur Bjarni Brattaberg afturat.

Og tíbetur hendi ongin mannaskaði.

### Sterkt smíðað

Sprytið er átta metrar langt av tí at bæði spryt, veirar og trossar endaðu framvið skipssíðuni, boðaðu teir landi frá, tí teir stúrdu fyri, at tað kundi banka hol á síðuna ella koma um skrúvuna.

Tí kom bjargingarbáturin, Lív til teir og fylgdust við teimum suður til Havnar og tað gekk væl.

Teir hava nú riggað alt av og fingið sprytið inn á dekkið og í morgun fóru teir av aftur Havnini við kós ímóti Vági.

Johanna er tryggjað og tá ið hon er komin til Vágs, verður skaðin sýnaður.

Hann leggur afturat, at annars er Johanna tiltikið sterkt smíðað.

- Táið vit vóru niðri við krígsveteranum í 1990, vóru teir gomlu krígssiglararnir púra samdir um, at sterkari slupp, við so góðum og sterkum rigningi, høvdu teir ikki verið umborð á.

### Avlýsa ferð

Gudmundur Jacobsen, sum er formaður í nevndini fyri Johonnu, sigur, at tey nú fara at bíleggja tilfar til nýtt sprit og krosstræ og so verður skaðin umvældur í vetur.

Ætlanin var, at Johanna skuldi fara ein svipp til Hetlands í næstum, men tann ferðin er avlýst av tí sama.

Annars er onki í vegin fyri at sigla og innanoyggja verður kanska onkur túrur gjørdur.

# Døglingar dripnir í Hvalba

Tá ið hvalbingar komu á føtur í morgun, varnaðust teir at tveir døglingar høvdu svomið seg upp á turt á sandinum.

Teir høvdu svomið seg upp í Rivið og høvdu ongan møguleika at sleppa av aftur.

Hvalbingar settu seg í sambandi við løgregluna og greiddu teimum frá støðuni og haðani varð mett, at einki var at gera uttan at taka teir.

Signar Olsen sigur, at tá ið teir tóku lívið av teimum, brúktu teir hetta nýggja slagið av knívum, har hvalurin bara verður stungin. Men tað er ein serligur knívur gjørdur til døgling og hann er væl størri enn vanligi knívurin til grind.

Hann sigur, at tað lukkaðist avbera væl at fáa lívið av døglingunum.

- Knívurin royndist sera væl, tí tað var bara ein einasti stingur, so doyðu teir við brestin.

Døglingarnir vórðu síðani sleipaðir út á bryggjuna í Nesi, har teir verða skornir upp. Tvøstið verður vigað og býtt til fólkið í kommununi, sum telur bygdirnar Hvalba og Sandvík.

Teir eru miðalstórur, men verða mettir at verða feitir.

Tvøstið er avbera gott, men spikið er ikki mannaføði.



*Hesir báðir svumu seg upp á turt í Hvalba í mánanáttina. Tvøstið er sera gott og tað kemur væl við, tí nú er langt síðani, at hvalbinar og sandvíkingar hava fingið feskt tvøst*